# Liðið hjá Allan er fremst

**Enn restar eitt umfar av FM kappingini í bridge, men eftir stigatalvuni at døma, er liðið hjá Allani Dal-Christiansen í løtuni best í Føroyum**

BRIDGE

*Bogi Simonsen og Arnbjørn Sivertsen*

## FM lið

Tey seinastu umførini í innleiðandi FM kappingini fyri lið vóru leikt um vikuskiftið í skúlanum í Runavík.

Liðið hjá Allani Dal-Christiansen vann 1. deild, men hóast hetta eru teir kortini ikki føroyameistarar enn. Enn er eitt umfar eftir at leika millum fýra tey fremstu liðini. Á liðinum hjá Allani leika Per Kallsberg, Dánjal Pauli Mohr, Jóannes Mouritsen og Heðin Mouritsen.

2.deild vann liðið hjá Jónu Grunnveit. Á liðnum hjá henni leika eisini Jógvan Juel Rasmussen, Eyðun Jensen, Eyðun Joensen, Høgni Hansen og Øssur Winthereig.

## Úrslitini vóru hesi:

**1.deild**

| | |
|---|---|
| Allan Dal-Christiansen — Oddmar Danielsen | 17-13 |
| Símin Lassaberg — Farodane | 21-09 |
| Carl Mikkelsen — Gunnar Mouritsen | 12-18 |
| | |
| Oddmar Danielsen — Gunnar Mouritsen | 08-22 |
| Farodane — Carl Mikkelsen | 25-05 |
| Allan Dal-Christiansen — Símin Lassaberg | 16-14 |
| Símin Lassaberg — Oddmar Danielsen | 25-04 |
| Carl Mikkelsen — Allan Dal-Christiansen | 12-18 |
| Gunnar Mouritsen — Farodane | 15-15 |

**Støðan í 1.deild:**

| | |
|---|---|
| 1. Allan Dal Christiansen | 203 |
| 2. Símin Lassaberg | 181 |
| 3. Farodane | 177 |
| 4. Carl Mikkelsen | 140 |
| 5. Gunnar Mouritsen | 119 |
| 6. Oddmar Danielsen | 63 |

**2.deild**

| | |
|---|---|
| Hanus Bærentsen — Gullkonto | 18-12 |
| Jóna Grunnveit — John Reid Skoralíð | 19-11 |
| Henny Egholm — Haldur Ellingsgaard | 18-12 |
| Eyðun Anthoniussen — Danny Transport | 17-13 |
| | |
| Henny Egholm — Hanus Bærentsen | 20-10 |
| Danny Transport — Haldur Ellingsgaard | 00-18 |
| Jóna Grunnveit — Gullkonto | 13-17 |
| John Reid Skoralíð — Eyðun Anthoniussen | 12-18 |
| | |
| Hanus Bærentsen — Jóna Grunnveit | 14-16 |
| Eyðun Anthoniussen — Gullkonto | 25-03 |
| Danny Transport — Henny Egholm | 00-18 |
| Haldur Ellingsgaard — John Reid Skoralíð | 20-10 |

**Støðan í 2.deild:**

| | |
|---|---|
| 1. Jóna Grunnveit | 280 |
| 2. Hanus Bærentsen | 262 |
| 3. Eyðun Anthoniussen | 234 |
| 4. Henny Egholm | 203 |
| 5. Haldur Ellingsgaard | 181 |
| 6. Gullkonto | 175 |
| 7. Danny Transport | 152 |
| 8. John Reid Skoralíð | 144 |

Finalurnar í FM kappingini fyri lið verða spældar í Klaksvík vikuskiftið 23. og 24. mars. Tey fýra liðini í FM bólkinum hava stigini frá innanhýsis dystunum í innleiðandi kappingini við sær í endaumfarið. Har er støðan hendan:

| | |
|---|---|
| 1. Allan Dal-Christiansen | 112 |
| 2. Farodane | 90 |
| 3. Símin Lassaberg | 86 |
| 4. Carl Mikkelsen | 72 |

Í Klaksvík skulu tey bæði fremstu liðini í 2.deild og tey bæði aftastu í 1.deild í ein upp- og niðurflytingarbólk at spæla ein dyst móti hvørjum øðrum um tvey pláss í 1.deild komandi kappingarár.

## Nýggj kortblandimaskina

Ta seinastu tíðina hava kortini til FM kappingarnar verið hondgivin, men FBS hevur nú keypt nýggjan kortblandara. Kortini, ið spæld vóru í Runavík, vóru tí teldugivin. Ymist er, hvat fólk halda um hetta. Summi vilja vera við, at teldan gevur heldur nógvar skeivar hendur. Serliga kortini, sum spæld vóru í 2.deild, høvdu nógvar skeivar hendur. Men her skulu vit síggja eitt spæl frá kappingini í 2.deild, sum tó ikki var so óvanligt.




V/allir

Norðan
862
T73
AKT54
A2

| Vestan | Eystan |
|---|---|
| KQJ54 | AT93 |
| AJ642 | AJ642 |
| - | J32 |
| T87643 | K |

Sunnan
7
KQ8
Q9876
QJ95

NS: Jógvan Juel Rasmussen og Jóna Grunnveit
EV: Steingrím Weihe og Símin Hansen

| V | N | E | S |
|---|---|---|---|
| pass | 1rú | D | 4rú |
| 4sp | pass | pass | 5rú |
| pass | pass | D | pass |
| pass | pass | | |

Eystan spældi spA út og skifti til trumf. Norðan tók á hondini, spældi spaðara til trumf, rútara til essið, trumfaði tann seinasta spaðaran og tók síðan rúQ.

Jógvan Juel hugsaði nú sum so, at líkindini vóru ikki góð fyri at vinna kontraktina. Eystan hevði upplýsingar-duplað, og var tí lítil ivi um, at hann hevði klK. Men ein dupladur niður var jú eisini eitt gott offurmeld móti 4sp. Fyri at tryggja sær, at hann ikki fór fleiri niður, spældi hann kleyvara til essið. Ætlanin var at kasta ein hjartara-tapara undir klQ, men tá klK fall undir essið, vann kontraktin.

Í hinum rúminum spældu EV eisini 5rú, sum fór ein niður, tá spælførarin klípti eftir kleyvara kongi.

## FM fyri blandað pør (mix)

Eftir kappingarskránni hjá FBS verður FM kapping fyri blandað pør, tað sum vit fyrr kallaðu mix-kapping, í Bridgehúsinum í Havn leygardagin 3. mars. Freistin at melda seg til hesa kappingina er úti 28. februar. Tey, ið ætla sær at spæla við, kunnu ringja til Marjuna Restorff, tel 31 91 42, ella skriva seg á lista, ið hongur uppi í Bridgehúsinum.

## NM fyri unglingar

Norðurlendska kappingin fyri unglingar (U-25), verður í Svøríki í juni. Hendan kappingin verður spæld annaðhvørt ár. Fyrstu ferð føroyingar sendu lið til hesa kappingina var í 1993. Fyrra árið, tá kappingin í Íslandi, sendu vit einki lið til kappingina. Ein trupulleiki við luttøkuni í hesi kappingini er, at vit hava ov fáar unglingar. Annar er, at kappingin er í próvtøkutíðini. Men vit hava frætt, at arbeitt verður við at fáa eitt lið við til kappingina í summar. Vónandi fer hetta at eydnast. Teir føroysku unglingarnir hava áður staðið seg avbera væl í NM kappingini, og tó at vit ikki eiga nógvar unglingar, so kunnu teir nú manna eitt sterkt lið við spælarum, sum allir hava leikt í 1.deild í vetur.



*Liðið hjá Allani fekk flest stig í fyrstu deild í ár, men enn er so seinasta og avgerandi umfarið eftir*











# Havnarmenn einsamallir á odda

**Úrslitini í áttanda umfari lagaðu seg ómetaliga gott fyri havnarliðið, sum nú liggja tvey stig fremstir eftir teirra sigur á hvalvíkingum. Sandavágsmenn halda enn í møguleikanum at koma undan botnstrikuni eftir stórsigur á oddaliðnum úr klaksvík, og í Vestmanna vann Hans Kristian Simonsen sensationelt á John Rødgaard.**

TALV

*Carl Eli Nolsøe Samuelsen*

Kappingin í fyrstu deild í ár hevur verið sera merkisverd. Javnt hevur verið allatíðina og nærum í hvørjum umfari hevur okkurt óhugsandi úrslit verið. Øll liðini hava verið sera óstøðug, eisini havnarliðið sum fyri fýra umførum síðani lá á aftasta plássi. Sjálvdan hevur eitt lið havt somu manning tvey umfør á rað, undantikið hvalvíkingar, og hetta er størsta orsøkin til óstøðugu úrslitini.

## Toppdysturin

Sigast kann at allir tríggir dystirnir í áttanda umfari vóru toppdystir, men skal nakar takast framum, varð tað dysturin millum Hvalvík og Havnina, sum saman við klaksvíkingum lógu javnir á odda.

Haldur Suni Johansen fekk ein góðan javnleik ímóti John Rødgaard í seinastu viku, og helt hetta rákið fram ímóti Martin Brekká. Haldur Suni leikti ágangandi, fekk góða støðu, og tá Martin ikki vildi býta frúgvar av, bleiv støða hansara bert verri. Haldur Suni leikti neyvt, fekk vinnandi álop og vann hareftir.

Herluf Hansen gjørdi ein øgiligan sjálvmálsleik tá hann púra óneyðugt misti frúnna í einari betri støðu ímóti Finnbjørn Zachariassen. Tílíkt kann henda fyri sjálvt tann besta, men tað pínir djúpt. Hetta varð einasta stig hvalvíkingar fingu.

Á triðja borði heldur ungi Olaf Berg fram við góðum spæli. Hesaferð vann hann á Sámal Christiansen í einum kompliseraðum talvi. Olaf hevur verið rættiliga álopssinnaður í ár, og offraði eisini sera taktiskt frúgv fyri rók, bisp og riddara og vísti hetta offrið seg at vinna sannførandi.

Johan E. Hansen royndi seg fyri fyrstu ferð fyri Havnina í fyrstu deild. Talvið hjá honum og Gunnar Joensen tóktiskt sera javnt tá Gunnar leikti avgerandi feil, og tapti sostatt.

Hvalvíkingar høvdu undan hesum umfari verið rímiliga støðugir. Trý dýr stig góvu teir havnarmonnum.

## Klaksvíkingar dumpaðu

Ein stórsigur ímóti sandavágsmonnum og FM-heitið kundi vælsaktans blivi teirra, men lið sum stríðast undan niðurflyting eru altíð vandamikin og hetta prógvaði teir har vesturi sunnudagin.

Torkil Nielsen er komin heimaftur eftir at hava verið til skips, meðan Rani Nolsøe var uttanlanda, og sat tí Steintór Rasmussen á fyrsta borði. Steintór tykist at hava fingið spæligleðina aftur og hevur hann fingið frálík úrslit í ár. Hann vann eisini á Torkil í talvi teirra.

Tummas Martin Anthoniussen hevur eisini havt eitt gott kappingarár, men tapti ímóti Bernhard Augustinussen. Gutti Petersen vann óvæntað á Ingolf Gaard á triðja borði, og Sonni Nielsen, sum somuleiðis hevur havt eitt gott kappingarár, vann sítt talv ímóti Rúna Dragaberg.

Heili 3-1 til botnliðið, sum nú mugu hava líknandi úrslit í teimum tveimum seinastu umførunum. Klaksvíkingar kunnu enn náa teirra mál, men mugu verða meira støðugir skal tað eydnast.

## Hans Kristian vann - KT tapti

Kollfirðingar hava ikki oftani í ár nýtt stórmeistara, og hevur hetta viðført at 17 ára gamli Hans Kristian Simonsen hevur havt ábyrgdina á fyrsta borði. Hesa uppgávu hevur hann røkt fyrimyndarliga, við eitt nú javnleiki ímóti Flóvin Tór Næs, og hevur hann nú eisini vunnið altjóða meistara. Hetta bleiv einasta stig kollfirðinga fingu. John Rødgaard hevur higartil ikki havt eitt heppið kappingarár.

Úrslitini í ár hava sum sagt verið sera óstøðug og er tí einki avgjørt. Næstseinasta umfar verður leikt 25. feb, og tá kunnu klaksvíkingar venda gongdini tá teir hitta Havnina í sonnum toppbraki. Hinir dystirnir verða; Kolafjørður – Hvalvík og Sandavágur – Vestmanna.

## Runavíkingar møttu ikki

Toftamenn fingu fýra løtt stig tá runavíkingar ikki fingu mannað lið. Óheppið fyri kappingina og Havnina 2, sum nú er hálvt stig aftanfyri Toftir. Havnarliðið vann sín dyst 2,5-1,5 ímóti Gøtu, men varð hetta ikki nóg mikið at varðveita fyrsta pláss.

Havnin 3 vann sín fyrsta dyst í ár, 3-1 á Klaksvík, men torført verður kortini hjá teimum at halda sær uppi í deildini.

Næsta umfar hittast bæði toppliðini, og verður hesin dysturin javnur er møguleiki fyri at gøtumenn, sum hitta Havnina 3, kunnu blanda seg av álvara undan seinasta umfari.

**1.Deild**

VT-KT 3-1
1. IM John Rødgaard (2335) - Hans K. Simonsen (1785) 0-1
2. Torbjørn Thomsen (2220) - Karl L. Johansen (1720) 1-0
3. John Jacobsen (1915) - Alvin Joensen (1600) 1-0
4. Dánjal P. Højgaard (1840) - Hans M. Andreasen (1325) 1-0

ST-KTF 3-1
1. Torkil Nielsen (2055) - Steintór Rasmussen (2055) 0-1
2. Bernhard Augustinussen (1850) - Tummas M. Antoniussen (1900) 1-0
3. Gutti Petersen (1575) - Ingolf Gaard (1770) 1-0
4. Sonni Nielsen (1745) - Rúni Dragaberg (1550) 1-0

TFS-HT 1-3
1. Martin Brekká (2070) - Haldur S. Johansen (2030) 0-1
2. Finnbjørn Zachariasen (2045) - Herluf Hansen (2020) 1-0
3. Sámal Christiansen (1845) - Olaf Berg (1815) 0-1
4. Gunnar Joensen (1845) - Johan E. Hansen (1595) 0-1

**Støðan eftir 8. Umfar**

| | | |
|---|---|---|
| 1. HT, Tórshavn | 4-3-1 | 18.5 |
| 2. KTF, Klaksvík | 3-2-3 | 16.5 |
| 3. TFS, Hvalvík | 3-2-3 | 16.5 |
| 4. VT, Vestmanna | 2-3-3 | 16 |
| 5. KT, Kollafjørður | 3-2-3 | 15.5 |
| 6. ST, Sandavágur | 1-4-3 | 13 |

**2. Deild**

TT-RT 4-0
RT møtti ikki

HT 2 -GT 2.5-1.5
1. Jóhan Gaard (1820) - Jónfinn Thomsen (1850) 1-0
2. Michael Jensen (1800) - John Joensen (1725) 0.5-0.5
3. Poul Poulsen (1770) - Reinhold Isaksen (1725) 0-1
4. Jógvan Næs (1680) - Jákup F. Joensen (1690) 1-0

KTF 2-HT 3 1-3
1. Petur H. Poulsen (1830) - Jón Andreasen (1635) 0-1
2. Óli Joensen (1615) - Jóannes V. Hansen (1645) 0.5-0.5
3. Esbern Christiansen (1605) - Jóannes Guttesen (1505) 0.5-0.5
4. Torleif E. Petersen (1575) - Mortan Thomsen (1350) 0-1

**Støðan eftir 8. Umfar**

| | | |
|---|---|---|
| 1. TT | 6-1-1 | 21 |
| 2. HT 2 | 7-1-0 | 20.5 |
| 3. GT | 3-0-5 | 17 |
| 4. RT | 3-0-5 | 14.5 |
| 5. KTF 2 | 3-0-5 | 13.5 |
| 6. HT 3 | 1-0-7 | 9.5 |

**3. Deild**

KTF 3-Rókur 3-1
1. Vagn Heldarskarð (1470) - Tordur Andreasen 1-0
2. Atli Jacobsen (1290) - Hans E.S. Jensen (1005) 1-0
3. Mannbjørn Anthoniussen (1210) - Bergur Johannesen (1375) 0.5-0.5
4. Jan Simonsen (1315) - Mikkjal Joensen (1140) 0.5-0.5

VT 3-KT 2 2.5-1.5
1. Joen P. Johannesen (1475) - Árant Djurhuus (1000) 1-0
2. Niels O. Durhuus (1390) - Teitur Joensen (1295) 0 .5-0.5
3. Hanus I. Hansen (1195) - Mervin S. Thomsen 0-1
4. Ingolf Debes (1190) - Jákup Simonsen 1-0

HT 4-VT 2 1.5-2.5
1. Sigurð Justinussen (1705) - Kári Durhuus (1770) 0.5-0.5
2. Suni Jacobsen (1675) - Jón Mikkelsen (1665) 1-0
3. Øssur Joensen (1650) - Jákup á R. Andreasen (1640) 0-1
4. Jákup A. Jensen (1580) - Jákup Durhuus (1630) 0-1

**Støðan eftir 8. Umfar**

| | | |
|---|---|---|
| 1. VT 2 | 6-0-2 | 24 |
| 2. HT 4 | 6-1-1 | 21 |
| 3. KT 2 | 5-0-3 | 20.5 |
| 4. KTF 3 | 2-0-6 | 11.5 |
| 5. Rókur | 2-0-6 | 10 |
| 6. VT 3 | 2-1-5 | 9 |

# Talvið hesa vikuna

Fremsti norski telvarin Simen Agdestein og superstórmeistarin Alexei Shirov leiktu 9. februar ein lítlan dyst. Fýra 15. minuttir talv blivu leikt, har Shirov vann ein tepran 2,5-1,5 sigur, eftir at Agdestein hevði verið framanfyri 1,5-0,5. Niðanfyrinevnda talv er hitt triða í dystinum.

Agdestein,S (2591) - Shirov,A (2718)
Radisson SAS Challenge Bergen NOR (3), 09.02.2001

1.d4 d5 2.c4 c6 Slavisk byrjan 3.Nf3 Nf6 4.e3 Bf5 5.Bd3 Bxd3 6.Qxd3 e6 7.0-0 Nbd7 8.Nc3 Bb4 9.Bd2 a5 10.c5 0-0 11.Na4 Ne4 12.a3 Bxd2 13.Nxd2 f5 14.f3 Nef6 15.b4 axb4 16.axb4 Qe7 17.Nb3 e5 18.Na5 Agdestein undirmetur álop Shirovs 18...e4 19.fxe4 Nxe4 20.Nxb7 Ndf6 21.Na5 Ng4 22.h3 Qh4! 23.Rf3 [23.Ra2 Rf6 24.Nb6 Qg3 25.hxg4 Rh6 og hvítur tapir; 23.hxg4 fxg4 Svartur hevur avgerandi álop] 23...Ng5 24.Qe2 Nxf3+ 25.Qxf3 Rae8 26.Nxc6 Rxe3 27.Qxd5+ Kh8 28.hxg4 fxg4 29.Ne5 Qf2+ 30.Kh1
(Diagram) g3! Og hvítur kann bert útseta svarta mátið við at ofra frúgv 0-1

